VÁGA KOMMUNA

Hammershaimbsvegur 1 // FO-360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo

# Reglur fyri viðgerð av umsóknum um grundstykki í Vága kommunu.

Reglugerðin er galdandi fyri allar útstykkingar og annað, har lendið er fingið til vega frá Vága kommunu til grundstykki.

Tá byggiøki verður kunngjørt alment, ber til at seta sítt ynski um grundstykkið.

Fyri at verða settur á listan og fáa eitt grundstykki skal umsøkjarin upplýsa nær ætlanin er at byggja.

Vága kommuna raðfestir umsøkjararnar soleiðis:

1. Umsøkjarar sum byrja at byggja beinanvegin ella innanfyri 1. ár, fáa tilluta stykki beinanvegin.
2. Bygt verður innanfyri 2 ár.
3. Bygt verður eftir 2 árum, tá ber ikki til at seta ynski um ítøkiligt stykki.

Ognarbræv til 1. og 2. verður at skriva og tinglýst.

Umsøkjarin verður skrásettur á bíðilista í raðfylgju eftir nær umsóknin er innkomin. Í móttøkuváttanini stendur í hvørjari røð umsøkjarin stendur.

Umsøkjari, ið stendur fremst á listanum, fær fyrst boðið grundstykki. Eru fleiri umsóknir til sama stykki innkomnar sama dag verður lutakast um, hvør skal hava stykki

Við grundstykki verður skilt grundstykki til vanlig sethús og grundstykki til tvíhús, raðhús og líknandi, uttan mun til, um bygt er á stykkinum ella ikki.

Um fleiri útstykkingar eru, skal umsøkjarin velja hvat øki hann ynskir at fáa grundstykki í, tað ber bert til at seta seg fyri eitt stykki.

Í sambandi við tillutan verða hjún og sambúgvandi mett sum ein umsøkjari. Verður tikið av tilboði, verður hjúnafelagin ella sambúgvin samstundis strikaður av listanum.

Umsøkjari, ið ikki tekur við bodnum grundstykki, kann verða standandi á sama stað á listanum, um hann ynskir tað.

Tá ikki verður tikið av bodnum grundstykki, verður grundstykki sett á listan, eftir tí dagfestingin har sagt verður frá, í tl raðfylgju tey sum eru á bíðilista eru eftir.

VÁGA KOMMUNA

Hammershaimbsvegur 1 // FO-360 Sandavágur
Tel +298 344 400 // vaga@vaga.fo

Er umsøkjari ikki byrjaður at byggja á tillutaðum grundstykki 2 ár eftir, at byggiloyvi kann verða givið, hevur kommunan rætt, men ikki skyldu til, at krevja grundstykkið aftur móti at rinda sama prís fyri grundstykkið, sum umsøkjarin rindaði.

Somuleiðis kann eitt stykki verða tikið aftur, um umsøkjarin, áðrenn bygging er byrjað, gerst eigari av øðrum grundstykki í kommununi.

Býráðið kann í undantaksføri víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð um serlig viðurskifti hjá umsøkjaranum greitt tala fyri hesum.

*Vága Kommuna*

*Rósa Samuelsen, borgarstjóri*